# Kanska følsk ávaring í Sørvági



*Í meiri enn tveir mánaðir hava tey í Sørvágs Laks livað í óvissuni. Fyrst í juli varð boðað frá ILA í alibrúkinum hjá teimum, men nú hevur óvissa tikið seg upp um royndirnar, sum vórðu tikna. Fleiri royndir skulu takast og Peter Østergaard væntar at svar ein av komandi døgum*

**Fyrst í juli mánað varð boðað frá, at ILA varð staðfest í Sørvági. Men kanska var ikki talan um ILA kortini. Ein orsøk til, at málið hevur drigið út, er, at eitt mistak hendi á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni**

ILA - ÁVARING
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Kanska var tað følsk ávaring, tá ið boðað var frá ILA í einum aliringi hjá Sørvágs Laks í Sørvági.

Í øllum førum hevur tað enn ikki borið til at staðfest, at talan er um ILA.

Heilsufrøðiliga Starvsstovan tók royndir úr alibrúkinum.

– Støðan er tann, at á Heilsufrrøðiligu Starvsstovuni vístu royndirnar, at talan var um ILA, sigur Peter Østergaard, djóralækni í fiskasjúkum.

– Men tá ið royndirnar síðani vórðu eftirkannaðar á eini starvsstovu í Århuus, vístu tær ongi tekin um ILA.

Peter Østergaard sigur, at stóri trupulleikin er, hvussu tað ber til, at kanningarnar á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni vísti, at tala var um ILA, men at eftirkanningin ongi tekin vísti til sjúkuna.

Hvussu tað ber til, er ilt hjá Peter Østergaard at siga.

Men hann ásannar, at eitt mistak hendi á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, tí royndirnar vórðu ikki goymdar sum tær áttu.

– Júst hetta málið fall saman við ymsum átrokandi uppgávum hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni og tí tíverri hendi tað mistak, at dupultroyndirnar komu ikki í kuldaskap, sum tær áttu, sigur hann. Tað kann gera, at royndirnar vísa, at onki ILA er.

Men orsøkin kann sjálvsagt eisini vera, at tað í veruleikanum onki ILA er.

Men hann leggur afturat, at Heilsufrøðiliga Starvsstovan hevur stórar trupulleikar við hølum og við manning.

– Hølistrupulleikar gera, at vit eru noydd at hava ymiskt virksemi í sama høli, sum ananrs átti at verið í hvør sínum høli. Sostatt verða eisini hesar royndirnar kannaðar í høli, sum annað virksemi eisini fer fram í og ger tað ómetaliga trupult at arbeiða og kann skjótt føra til, at royndir verða dállkaðar.

Tað er kortini ikki so, at royndirnar verða dálkaðar á tann hátt, at royndir frá fleiri alibrúkum verða blandaðar saman, so at eitt alibrúk at órætti kann verða lagt undir at hava ILA fyri tí um sjúka er í einum øðrum alibrúki.

Men tað tað kann vera hent, at ymsar royndir í sama alibrúki verða dálkaðar, so at virði av dupultroyndum verður burtur.

Hann sigur, at tey hava manningartrupulleikar, tí tey høvdu eisini havt brúk fyri einum serútbúnum fólki til hetta slagi av kanningum.

Tað, sum nú hendur, er, at fleiri royndir skulu takast, sum síðani skulu sendast til Noregs til kanningar.

Peter Østergaard sigur, at tí koma nakrir dagar at ganga afturat, áðrenn ein endalig støða fyriliggur.

– Antin er støðan tann, at vit hava sent út eina falska ILA ávaring og at onki ILA er í Sørvági. Ella er ILA í alibrúkinum, men at okkurt er hent við royndunum, frá tí, at vit hava kannað teir, til tær eru eftirkannaðar í Århuus.

Peter Østergaard ásannar, at hetta er ein sera keðilig støða fyri alibrúkið, men at hann væntar endaligt svar um nakrar dagar.

Hann sigur, at orsøkin til, at tað er gingin so long tíð, er partvís, at summarfrítíð hevur verið og tað at Starvsstovan hevur havt onnur mál, sum hava havt skund og tí hevur tað drigið út.

– Men støðan er ómetaliga keðilig, bæði fyri okkum og fyri alibrúkið, men fáa vit ikki betri. umstøður, koma vit ikki langt á hesum øki, sigur Peter Østergaard.

# Eitt minni fyri lívið

**Motorsúkklustevnan í Suðuroy hepnaðist avbera væl. Veðrið var gott, áhugin stórur og blíðskapur skortaði ikki**

MOTORSÚKKLU-STEVNA
*Àki Berrtholdsen*
*aki@sosialurin. fo*




*Tað var fitt av fólki og hugdu at motorsúkklunum, har tær stóðu so stásiligar uttanfyri Statoil á Tvøroyri seinnapartin leygardagin*

Hetta var eitt minni fyri lívið.

Øll tey mongu motorsúkklufólkini, sum koyrdu Suðuroynna á tamb í vikuskiftunum vóru avbera væl nøgd.

Og vit hava tosað við meiri enn ein, sum helt, at hetta var eitt minni fyri lívið. Tey halda, at áhugin fyri súkklunum og blíðskapurin á ferðini var størri enn tey eru von við á øðrum ferðum og tað fløvaði, siga tey.

Ein fortreyt fyri einum góðum túri á motorsúkku, er veðrið og ikki kann sigast annað, enn at tey høvdu veðurgudarnar í sínum parti hetta vikuskiftið. Leygardagin var veðrið av tí allarbesta. Sunnudagin var eitt sindur meiri vindur, men ikki so tað bilaði - og hekkuportrið á Smyrli var ikki meiri enn komin í lás, so oysregnaði.

Tað vóru eini 90 motorsúkklufólk úr øllum landinum, sum høvdu sett hvørjum øðrum stevnu í Suðuroynni hetta vikuskiftið. Tilsamans vóru um 60 súkklur av øllum sløgum og øllum støddum við. Av teimum vóru um helmingingurin norðaneftir og helmingurin vóru súkklur úr Suðuroy.

– Hetta eru meiri enn tað plagar at vera, men tað hevur eisini verið ein ótrúliga góður túrur, sigur Ove Ritter úr Havn, sum er av tí sanna motorsúkklufólkinum.

Tvær ferðir um árið verður skipað fyri stevnu sum hesari og stevnurnar eru fyri øll, sum hava áhuga fyri motorsúkklum. Tað er sostatt ikki neyðugt at eiga súkklu fyri at vera við. Stevnurnar eru altíð fyrsta vikuskiftið í mai, tá ið motorsúkkluárið byrjar og seinna stevnan er altíð fyrsta vikuskiftið í september, áðrenn allarflestu súkklurnar verða settar undir tak fyri veturin.

Motorsúkkluáhugaðir í Føroyum hava stovnað felagið MC- Føroyar og tað er hetta felagið,sum aðruhvørja ferð skipar fyri hesi motorsúkklustevnuni. Aðruhvørja ferð er tað Føroya Ellisakfar, sum skipar fyri. Hesuferð áttu Føroya Ellisakfar tørn at skipa fyri.

Hetta er áttandu ferð, at skipað verður fyri motorsúkklustevnu, men hetta er tann fjølmentasta, sum hevur verið.

## 300 motorsúkklur

At koyra á motorsúkklu er ein áhugi, sum hevur vundið heilt nógv upp á seg í Føroyum seinastu tíðina.

– Í løtuni eru einar 300 motorsúkklur skrásettar í Føroyum og tað er nógv meiri enn fyri nógv árum síðani.

Men tað er væntandi, at hetta fer at vinda nógv meiri uppá seg, tí eftir fólkatalinum eru tað bara helvtina so nógvar motorsúkklur í Føroyum sum í Danmark.

Tað hevur eisini altíð verið sagt, at tað er eitt mannfólkaítriv burturav at koyra á motorsúkklu.

Hetta er ikki sannleikin longur, tí tað sær út til, at verða blivið eitt satt mótarák ímillum konufólk at fáa sær koyurikort til motorsúkklu.

Ein á stevnuni, sum stutt síðani hevði tikið koyrikort til motorsúkklu, greiddi frá, at á tá ið hon tók koyrikortið, vóru tey 17 tilsamans, men bara trý av teimum vóru mannfólk.

– Vit vera fleiri og fleiri, sigur Ove Ritter.

Hann sigur, at ofta eru tað fólk, sum eru komin eitt sindur til árs, men sum ikki hava roynt tað áður, sum nú fáa sær koyrikort til motorsúkklu.

– Men talan er eisini um nógv fólk, sum eru komin upp í árini, men sum koyrdu motorsúkklu á ungum árum. Men so fingu tey børn og seldu motorsúkkluna og keyptu barnavogn ístaðin.

– Nu eru so børnini farin úr reiðrinum og so kemur longsulin eftir motordrivna hjólhestinum aftur.

Men tað eru eisini nógv ung, sum fáa sær motorsúkklu

## Rossafólk við motori

Ove Ritter heldur, at motorsúkklufólkið er ikki øðrvísi enn rossafólkið. Tey hava rossini, vit hava súkkluna.

– Vit koma nógv út í nattúruna, vit fáa nokk av frískari luft. Tað er balsam fyri sálina at koma burturúr gerandisdegnum eina løtu og føla roykin av grasi í nasunum. Og vit eru eisini partur í einum felagsskapi, tí vit, sum koyra motorsúkklu, hava altíð nóg mikið at práta um.

Les eisini síðu 7.



# Skitna vatnið kostaði virkisleiðaranum starvið

**Virkisleiðarin á Føroya Fiskavirking í Miðvági, Albert Ellefsen, er farin úr starvinum. Beinleiðis orsøkin er málið um dálkaða vatnið, sum virkið hevur brúkt í framleiðsluni**

UPPSØGN
*Edvard Joensen*
*edvard@sosialurin.fo*



*Albert Ellefsen hevur persónliga tikið avleiðingarnar av, at Føroya Fiskavirking í Miðvági hevur arbeitt fisk við dálkaðum vatni, og hevur sagt seg úr starvinum sum virkisleiðari*

*Mynd: Edvard Joensen*

**Miðvági:**
Albert Ellefsen er farin út starvinum sum virkisleiðari á Føroya Fiskavirking í Miðvági. Hann helt seg ikki kunn halda fram, eftir at virkið hevði arbeitt matvørur við dálkaðum vatni.

–Tað er rætt, at beinleiðis orsøkin til, at eg eri farin úr starvi, er hatta málið um dálkaða vatnið, sigur Albert Ellefsen. Eg havi sjálvur valt at siga meg úr starvi, sigur hann.

Tað er ikki fyrstu ferð, at Føroya Fiskavirking í Miðvági hevur havt trupulleikar av skitnum vatni, sigur Albert Ellefsen. Og hann leggur afturat, at hann longu framman undan hesi hendingini hevði gjørt av, at um slíkt hendi aftur, átti hann at leggja frá sær. Ta avgerðina hevur hann so uppfylt nú.

– Eg eri øgiliga keddur av at noyðast at fara úr hesum starvinum. Tað var eitt dreymaarbeiði eg hevði, sigur hann. Eg treivst væl og haldi, at eg kom væl út av tí við fólkið eisini.

Albert Ellefsen er einki fyri at gera nakrar viðmerkingar annars til støðuna, sum hon er í dag. Tó sigur hann, at hann vónar, at virkið kann fara í gongd aftur heilt skjótt. Men tað krevur, at Miðvágs Kommuna tekur seg saman og fær eina endaliga loysn á hesum trupulleikanum, sum ikki er nýggjur.

–Tað ber heilt einfalt ikki til, at slíkt skal endurtaka seg, sigur Albert Ellefsen, fyrrverandi virkisleiðari á virkinum hjá Føroya Fiskavirking í Miðvági.

## Mist álitið

Stjórin á Føroya Fiskavirking, Meinhard Jacobsen, er kanska meira rísin enn harmur um tað, sum hent er.

– Vit hava heilt einfalt mist alt álit á Miðvágs Kommunu, sigur hann. Tað líkist púra ongum, at vit hava framleitt matvøru í fleiri dagar við dálkaðum vatni, samstundis sum kommunan hevur vitað av, at brot hevur verið á vatnveitingini, og at vatn tískil hevur verið tikið aðrastaðni frá enn bara úr vanligu veitingini.

Og tað er ikki nokk við tí, sigur Meinhard Jacobsen. Føroya Fiskavirking hevur eisini fyrr í summar verið í holt við Miðvágs Kommunu og víst á júst vandan, sum standast kann av, at vatnið verður dálkað.

– Tann 27. juni í ár frættu vit, at ein bóndi í Vágum ætlaði at fara at spræna tøð fram við vatngoymsluni í Miðvági. Tá talaðu vit at á einum fundi, vit fingu við kommununa. Tað varð so steðgað, júst tí, at vit vístu á, hvat tað kundi fara at kosta, um vatnið varð dálkað, sigur stjórin á Føroya Fiskavirking.

Hann sigur seg hava frætt, at ein maður, sum hevur við vatnið hjá Miðvágs Kommunu at gera, hevur veirð á havnarlagnum í Miðvági og har sagt onkrum, sum arbeiðir á Fiskavirking, at galið er við vatninum. Men eingin formlig fráboðan er komin frá kommununi til leiðsluna á Føroya Fiskavirking.

– Vit halda tað vera skomm fyri Miðvágs Kommunu, at teir hava hildið hetta dult bæði fyri okkum og eisini fyri borgarunum í kommununi. Hetta líkst ongum, og vísir bert, at Miðvágs Kommuna er eitt serdømi í at rigga illa, sigur ein ilskur Fiskavirkisstjóri.

## Øgiligar avleiðingar

Hetta fær stórar avleiðingar fyri virkið og ikki minst fyri øll tey fólkini, sum dagliga hava arbeitt á virkinum.

Virkið liggur stilt og fer at gera tað, líka til heilt greitt er, at Miðvágs Kommuna endaliga og fullgott hevur loyst hendan trupulleikan, sigur Meinhard Jacobsen.

Hann heldur tað vera út av lagi vánaliga handfaring av nógv tí størsta arbeiðsplássinum í oynni, at tað skal fara so illa av kleyvarskapi.

– Vit vita, at vøra er dálkað og arbeiða framvegis við at taka royndir av tí, vit hava framleitt. Talan er um hundraðtals - kanska túsundtals - royndir, vit noyðast ígjøgnum, til vit við vissu kunnu siga, um hvør einstakur pakki er dálkaður ella ikki. Og tað er ikki smávegis.

Var hetta fyrstu ferð, var tað so tað, tað er, sigur hann. Men hetta er hent fyrr. Eitt nú misti virkið í Miðvági einar fimm milliónir krónur í 1998, júst av somu orsøk, vísir hann á.

Árið í ár verður helst nakað slakt, sum útlitini í løtuni eru. Í fyrsta lagi lá virkið stilt í ein mánað i vár, meðan verkfallið var. Nú hevur verið stongt í einar fjúrtan dagar orsakað av bakterium í vatninum. Og eftir ætlan skal ein størri um- og útbygging gerast á virkinum seinni í heyst.

– Var tað soleiðis, at vit høvdu fingið fráboðan frá kommununi um, at galið var við vatnveitingini, kundi vit kanska samskipað hendan steðgin og útbyggingina eitt sindur, sigur Meinhard Jacobsen. Men soleiðis er ikki.

Tað eru í sær sjálvum ikki bakteriurnar í vatninum sum so, ið eru trupulleikin, vísir Meinhard Jacobsen á. Tað er meira tað, at vatnið, sum tikið er úr áunum, er so gruggugt av mógvi og mold, at UV strálurnar á reinsiverkinum, sum skuldu dripið bakteriurnar, ikki klára at treingja ígjøgnum hetta brúna vatnið, sigur hann. Tær eru slopnar ígjøgnum leiðingina og eru endaðar á virkinum hjá Føroya Fiskavirking og ivaleyst í vanligum sethúsum í Miðvági eisini, heldur hann.

Borgarstjórin í Miðvági, Jóan Pauli Fredriksen, var ikki at hitta, tá roynt varð at fáa viðmekringar frá honum til málið, áðrenn blaðið fór til prentingar.

